# Útbyggja bátahylin í Hvalvík

**Arbeiðið at útbyggja bátahylin í Hvalvík líður sera væl. Tá arbeiðið verður liðugt, verður pláss fyri einum 30 bátum afturat í bátahylinum**

ÚTBYGGING
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*




*Arbeiðið at gera verjugarð uttanum bátahylin í Hvalvík líður sera væl, og er hann um at verða liðugur. Nú liggja bátarnir væl í øllum ættum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Síðan í heyst hevur verið arbeitt við at leggja ein verjugarð uttan um sunnara partin av bátahylinum í Hvalvík. Orsøkin til arbeiðið er, at sera ófriðarligt hevur verið í bátahylinum í ymsum ættum, serliga tá hann hevur ligið av landnyrðingi.

Verjugarðurin fer at gera, at bátarnir kunnu liggja tryggir har alt árið. Harafturat verður pláss fyri einum 30 bátum afturat í bátahylinum, tá arbeiðið er liðugt.

## Grót frá SEV

Stutt frá Hvalvík liggur Norðskálatunnilin, og har arbeiðir SEV í løtuni við Eiði 2 verkætlanini, har teir bora frá tunnilsmunnanum við Norðskála og norður til Svínáir. Eisini verður seinni borað suður til Selatraðar, so mekira vatn fæst til Eiðiverkið við Ljósáir. Tað eru sera stórar mongdir av gróti, ið koma burturúr hesum arbeiði, og hetta hevur Sunda Kommuna fingið sum mest burturúr. Sunda Kommuna hevur gjørt avtalu við SEV um at taka móti 100.000 tonsum av gróti, sum umframt til bátahylin í Hvalvík, eisini verður nýtt til havnaløgini í Hvalvík og á Oyri.


# SUÐURGARÐ
**Ráðgeving & Leiðslumenning**




Við tilstuðlan frá mongum bjóða vit nú saman við okkara danska og føroyska netverki opin hold í leiðaraútbúgvingunum:

**GLÚ, Grundleggjandi leiðaraútbúgving byrjar 4. mars 2009 á Hotel Føroyum**

Útbúgvingin er sera vælegnað til leiðarar, deildarleiðarar, fyristøðufólk, verkførarar og formenn. Her lærir tú millum annað hvat góð leiðsla er, at handfara ósemjur og trupulleikar, at blíva betur til at samskifta og at tilrættaleggja egna tíð.

**PLÚ, Grundleggjandi projektleiðaraútbúgving byrjar 19. mars 2009 á Hotel Føroyum**

Útbúgvingin er ætlað leiðarum frá bæði privatum og almennum virkjum og lyklapersónum, sum arbeiða við verkætlanum. Tú lærir millum annað at gera eina verkætlan við virksemisyvirliti og hvussu tú skapar motivatión og áhuga, tá tú skalt byrja eina verkætlan, samanseta og menna ein projektbólk.

Les meir um útbúgvingarnar á **www.sudurgard.fo**

Tilmelding fer fram á sudurgard@sudurgard.fo

**Um ivamál eru ring til Pólinu Suðurgarð, tlf. 332028 ella 221684**

Sp/f Suðurgarð · Ovastuhjallar 11
FO-360 Sandavágur · Tel 33 20 28
Far 22 16 84 · sudurgard@sudurgard.fo
www.sudurgard.fo



# Móttøka
## Suðuroyar Ellis-& Røktarheim

Í samband við, at



Sunneva Petersen fer úr starvi sum leiðari fyri Suðuroyar Ellis-& Røktarheimi, og



Anna Djurhuus tekur við sum nýggjur leiðari, verður móttøka

í matarhøllini á
Suðuroyar Sjúkrahúsi
fríggjadagin 13. februar
millum kl 14 og 16.

Suðuroyar Ellis-& Røktarheim